– stórt og gott úrval av brúktum bilum frá
REYNI SERVICE P/F

| Bilur | Skrás.: | Km.: | Sýnaður: | Prísur: |
|---|---|---|---|---|
| TOYOTA CAMRY 2.2 GL Sedan | okt 99 | 77.000 | jun 03 | 149.000 |
| TOYOTA AVENSIS 2.0 T-DIESEL | jul 98 | 105.000 | - | 132.000 |
| TOYOTA AVENSIS 2.0 D4-DIESEL SEDAN | okt 01 | 106.000 | - | 169.000 |
| TOYOTA AVENSIS 1,8 TERRA SEDAN | mar 00 | 32.000 | - | 136.000 |
| TOYOTA CARINA E 1,6 CDX SEDAN | okt 96 | - | - | 69.000 |
| TOYOTA COROLLA 1.3 TERRA H/B | juli 99 | 74.000 | jun 03 | 89.000 |
| TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA LIFT BACK | apr 00 | 85.000 | - | 98.000 |
| TOYOTA COROLLA 1.4 LINEA TERRA STW | nov 00 | - | - | 123.000 |
| TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA SEDAN | okt 97 | 90.000 | okt 02 | 74.000 |
| TOYOTA HI-ACE 2.4 D LANGUR | mai 99 | 75.000 | feb 03 | 136.000 |
| TOYOTA AVENSIS 1.8 LINIA TERRA STW | des 01 | 38.000 | - | 178.000 |
| TOYOTA HI-ACE 2.4 D LANGUR | aug 90 | - | - | 28.000 |
| TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL PLUS | mai 98 | 98.000 | - | 142.000 |
| FORD ESCORT 1.8 TURBO DIESEL | jun 97 | 111.000 | sep 03 | 68.000 |
| TOYOTA AVENSIS 2.0 D TERRA SEDAN | feb 01 | 95.000 | - | 158.000 |
| OPEL VECTRA 2.0 S/D | jul 92 | 215.000 | aug 02 | 35.000 |
| TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL AUT SEDAN | okt 02 | 52.000 | - | 221.000 |
| MAZDA 323 1.8 | aug 96 | 32.000 | - | 77.000 |
| TOYOTA CAMRY 2.2 I | okt 92 | 239.000 | sep 02 | 69.000 |
| FORD ESCORT 1,8 TURBO DIESEL | nov 97 | 104.000 | aug 03 | 62.000 |
| TOYOTA COROLLA 2.0 D TERRA S/D | jul 99 | 96.000 | nov 02 | 109.000 |
| HONDA CIVIC 1,4 IS | apr 97 | 120.000 | feb 02 | 63.000 |
| TOYOTA COROLLA 2,0 D TERRA | nov 98 | 70.000 | - | 96.000 |
| KIA PRIDE 1,3 | feb 00 | 48.000 | - | 49.000 |

Sosialurin 341800

G.g. bilarnir á listanum kunnu vera seldir
Toyota bilar hava trý ára garanti frá fyrsta regestrerings dato
Bilar yvir kr. 75.000,- hava 3 mdr. brúktbilaváttan

REYNI SERVICE P/F
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

## VIÐMERKINGAR

# Hví ikki royna demokrati?

Zakarias Wang



Nú verður løgtingsval, og tann 20. januar 2004 vita vit hvørji tey 32 verða, sum vit hava givið heimild til at avgera okkara framtíð.

Tungar eru tær avgerðir, sum komandi løgting fer at taka okkara vegna.

Danmark, sum vit eru saman við, hevur í 1000 ár verið eitt sjálvstøðugt ríki. Innan fyri eitt ella tvey ár skulu danir taka støðu til, um ríki teirra skal leggjast niður. Lítil ivi er um, at teir fara at taka undir við hesum uppskoti, so Danmark fer at gerast eitt deilríki í Evropeisku uniónini.

So kemur upp spurningurin: hvat við okkum?

Tá er avgerandi, hvør okkara støða er til Danmark.

Tíbetur eru øll tey, sum skil hava fyri hesum viðurskiftum, greið yvir, at Føroyar saman við Grønlandi er er eitt deilríki í eini unión, har bert eitt annað deilríki er, og tað er Danmark.

Vanliga hugsa vit ikki so nógv um at so er, tí síðan 1661 hava vit lagt alt lóggávuvald, gerðarvald og dómsvald til kong okkara, sum hevur latið onnur tikið sær av hesum málum. Frá 1849 hava tað verið ráðharrar hansara og teir hava so latið heimastýrini í Føroyum og Grønlandi eins og kommunur fingið nakað av tí valdi, vit hava latið kong hava.

Men tað vald sum eftir er hjá kongsins ráðharrum er stórt. Teir hava hervaldið, løgregluna, og so hava teir eisini myndugleikan til at gera sáttmálar við onnur lond, soleiðis at hesir sáttmálar eru galdandi fyri okkum.

Hetta er eitt vald sum teir nýta. Tá teir í 1949 undirritaðu norðuratlandshavssáttmálan, kom tað ikki upp á tal at vit skuldu spyrjast, sjálvt um sáttmálin var galdandi fyri bæði Grønland og Føroyar. Tá sambandsmaðurin Poul Niclasen spurdi á danatingi, um vit ikki skuldu sleppa at siga hvat ið vit hildu, var svarið eitt háðandi nei.

Nú er Danmark farið upp í kríggj í Irak. Í samveldissáttmála okkara við Danmark verður sagt, at annað ríkið kann ikki fara í kríggj uttan at hitt gevur sítt samtykki. Hví kann Danmark so fara í kríggj uttan okkara samtykki? Svarið er, at vit hava givið okkara samtykki upp á forhond við framvegis at góðkenna at liva undir 1661-konstitutiónini og ikki síggja til fáa eina aðra í staðin fyri.

Tá Danmark fer upp í Europasamveldið, samtykkja teir harvið at fara í kríggj við tey lond, sum tað hóvar hesum samveldi at senda sína hermegi ímóti. Limaskapurin í samveldinum fevnir tí eisini um okkum eins og danski NATO-limaskapurin ger tað, og eins og danska kríggið móti Iraq eisini er okkara kríggj.

Hvat kunnu vit gera við hetta?

Higartil hava vit tikið undir við tí ódemokratisku 1661-konstitutiónini við einki stig at taka til at taka hana av.

Men kunnu vit tað?

Ja, tað kunnu vit!

Tað sum ger tað so ringt hjá politikarum okkara at foreina seg við, at nakað kann gerast við hetta mál, er at vit sum føroyingar ikki kunnu gera nakað við hetta mál einsamallir, tí deilríki okkara fevnir eisini um Grønland. Grønlendingar hava heldur ikki einsamallir rætt til at taka av ta konstitutión sum vit hava saman við teimum. Fyri at koma nakra leið og fáa demokrati í lag í ríki okkara, er neyðugt at okkara landsstýri vendir sær til grønlendska landsstýrið og at vit gera eina felags stjórn, sum kann umboða okkum mótvegis okkara uniónsfelaga.

Tað natúrliga er, at ein slík felags stjórn hevur ábyrgd mótvegis einum tingi, sum er valt av øllum íbúgvum í deilríki okkara.

Men kunnu danir ikki bara siga nei til at vit velja eitt slíkt felags ting?

Nei, tað kunnu teir ikki.

Orsøkin til hetta er, at samveldissáttmálin sigur at borgararnir í deilríkjunum sjálvir stýra teimum, og konstitutión okkara frá 1661 sigur, at kongur ikki kann broyta hana, men bert tey innbornu.

Hvussu langa tíð hevði tað tikið at fingið demokrati í lag í ríki okkara og harvið givið okkum sama rætt sum Danmark til at stýra ta unión, sum vit hava við Danmark?

Siga vit, at nývalda landsstýrið sum sína fyrstu gerð vendir sær til grønlendska landstýrið og landsstýrini semjast um at velja eitt felags ting, so skal vallóg gerast og finnast skal fram til, hvar umboðini skulu møtast. Hetta kann helst ikki klárast upp á minni enn tveir mánaðir.

Tá hetta tingið er sett, hevur tað alt lóggávuvald, gerðarvald og dómsvald í ríki okkara.

Hevur danski forsætisráðharrin hug til at fara í nýggj kríggj, so sleppur hann ikki uttan so at stjórn okkara góðkennir hetta. Um so er at danskir politikarar halda at Danmark skal fara upp í tann nýggja europeiska statin, so kemur hetta ikki upp á tal uttan at vit siga ja til at vera við.

Tað sum føroysku veljararnir til hetta løgtingsvalið hava í at velja er tí annaðhvørt at halda fram við at liva undir tí núverandi ódemokratisku skipanini, ella fáa í lag demokrati í ríki okkara.



Sel húsini í Sosialinum
og á www.portal.fo
SETHÚSAMARKNAÐURIN







## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Jógvan Rasmussen 75 ár



Seinasta fríggjadag, 5. desember, fylti Jógvan Rasmussen í Havn 75 ár. Jógvan er ein av kendu hýruvognsførarunum í Havn. Hann er ættaður av Sandi og flutti til Havnar í 1944, har hann m.a. arbeiddi á bilverkstaðnum hjá Vilhelm Nielsen.

Jógvan hevur koyrt á bilstøðini Auto síðan 1958. Hann koyrdi ein hýruvogn hjá Johannes Berg eina tíð, til hann fekk sín egna hýruvogn. Hann hevur verið partaeigari í støðini síðan 1964.

Hann hevur arbeitt sum hýruvognsførari í 45 ár, ið má sigast at vera ein langur arbeiðsdagur, og hann koyrir framvegis hvønn dag.

Jógvan er giftur við Brynhild, f. Johannessen, úr Havn. Børnini børnini hjá teimum eru: Olfert, Eirikkur og Myrna, sum búgva í Havn, Aðalgunn og Tanja, sum búgva í Danmark, og Gvøbjørg, sum býr á Argjum.

# Óli Hammer heiðursborgari í Hantsholm



**Hósdagin 11. desember bleiv stjórin á Smyril Line, Óli Hammer, kosin »Årets Akvamanileborger 2003« í býráðssalinum á ráðhúsinum í Hanstholm**

Hesin heiðurin verður latin til borgarar, sum á ein ella annan hátt hava givið Hantsholm Kommune positiva umtalu, bæði í kommununi og uttanfyri.

Stýrið fyri Hanstholm Turistforening hevur í ár tikið avgerð um at heiðurslønin í ár skal fara til stjóran í Smyril Line, Óla Hammer, og til fyrrverandi leiðaran í »Rutelaget Askøj – Bergen A/S, Torvald Lahn - Johannessen.

Almenna móttøkan varð hósdagin 11. desember kl. 16.00 í býráðssalinum á Ráðhúsinum í Hantsholm, har formaðurin fyri Hanstholm Turistforening, Gunda Odgaard, handaði teimum akvamanile-medaljuna og heiðursbrævið. Eisini heldur Ejner Frøkjær, borgarstjóri í Hanstholm, røðu, har hann grundgevur fyri, hví teir fáa hesa heiðurslønina.

# Olivur við Neyst 50 ár



Í dag, fríggjadagin 12. desember, fyllir Olivur við Neyst, listamaður, í Havn 50 ár.

Olivur er klaksvíkingur, sonur Sybillu, f. Thomsen, úr Klaksvík og Hans við Neyst, ættaður úr Hvalba.

Umframt at Olivur lærdi til radiomekanikara hjá Marstein í Klaksvík, er hann eisini útbúgvin á málaraskúlanum á listaakademinum í Keypmannahavn hjá Richard Winther og Vilhelm Freddie 1975-79, síðan á listanámsligari linju hjá Helge Bertram 1979-1981.

Olivur hevur eisini teknað til fleiri tíðarrit og bøkur, og gjørt veggjaprýði á ymiskum stovnum. Hann hevur fingið námsstyrk t.d. frá Statens Kunstfonds arbejdslegat 1981.

Hann ger nógv av at mála býarumhvørvi, har hús og tún og gøtur ganga inn í ein kubistiskan, stundum kaleidoskopiskan bygnað. Hann málar eisini umhvørvi úr havnini við bátum, skipum og fólki, og umhvørvi frá arbeiðslívinum. Í eini røð av bókamyndum, serliga vatnlitamyndum, lýsir hann fólk, fugl og dýr, skip og bátar í føroyskum umhvørvum og landsløgum.

Í eini grein í Politiken, nov. 1996, skrivaði Peter M. Hornung um Olivur: »En færøsk maler glemmer ikke nemt naturen for de påvirkninger han møder under fremmede himmelstrøg. Og Olivur við Neyst forener evnen til at skabe koloristisk liv med sansen for at fastholde essensen af miljøer, lys og bevægelse. Hvis man forbinder den færøske naturskildring med begsorte klipper under truende himle, vil Olivur við Neysts farvelyriske besyngelser af landskabet og bostederne komme som en åbenbaring. Og som eksklusiv akvarelmaler alene møder man ham gerne på hans næste udstilling«.

Olivur hevur eisini havt framsýningar í Svøríki, Danmark og í Íslandi.

## Dagurin

**12. desember. Epimachus,** deyður umleið ár 250. Kristin maður í Aleksandriu, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari ráddi.